Starvslýsing

Heimatænastan

## Starvsfólk til Heimatænastuna í øki 5 Suðuroy

**Í samband við at nýggja Røktarheimið í Vági væntandi letur upp 1. mai 2011 verður søkt eftir:** deildarleiðara, sjúkrarøktarfrøðingum, heilsurøktarum og heilsuhjálparum, fysioterapeuti, køksstarvsfólki, húsavørði og roknskaparfólki.
Í tráð við visjónirnar hjá Heimatænastuni um at samskipa allar tænastur innan økið, søkja vit eftir starvsfólki, ið hava hug og hegni at arbeiða, har tænasturnar eru samansjóðaðar.

Talan er um nýggj og spennandi størv við nýggjum avbjóðingum innan eldraøkið, har tú fært møguleikan at vera við til at uppbyggja og samansjóða allar tænastur, ið Heimatænastan hevur at bjóða í Suðuroyar sunnaru helvt.

**I dag fevnir Heimatænastan í økinum um:**

- 24 búpláss og umlættingarpláss á røktarheiminum í Vági
- 12 búpláss og umlættingarpláss á eldrasambýlinum í Vági
- Heimasjúkrarøkt
- Heimahjálp
- Mattænastu
- Økisterapi
- Dagtilboð til heimabúgvandi pensjónistar

Sum starvsfólk fert tú at vera við at skipa eina fyrstafloks samansjóðaða nærtænastu,
har vit við umsorgan stuðla virkisførleika og vælveru hjá tí einstaka borgaranum. Har góður yrkisligur og menniskjaligur kunnleiki miðvíst tryggjar, at borgarin er í góðum hondum.

**Vit vænta av tær, at tú:**

- Hevur viðkomandi útbúgving og starvsroyndir
- Hevur hug at virka í samsvar við "Eden"hugsjónina
- Hevur royndir innan eldraøkið
- Hevur evni at samstarva við búfólk, avvarðandi, starvsfólk og leiðslu
- Hevur telduførleika á brúkarastøði
- Koyrikort til bil

**Vit kunnu bjóða:**

- Eitt dynamiskt og fjølbroytt starv
- Eitt jaligt og vinarligt arbeiðsumhvørvið
- Eitt starv við nógvum avbjóðingum
- Fakliga og persónliga menning

**Setanar- og lønarviðurskifti:**
Setanarstaðið er Nærverkið við tænastu í løtuni í Heimatænastuni í øki 5. Løn- og setanarviðurskifti er sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

**Nærri fæst at vita** um størvini og starvslýsingar við at venda sær til Jeannu í Lágabø, økisleiðara á tlf. 373907.

**Umsóknir:**
Skrivlig umsókn saman við avriti av prógvum, viðmælum v.m. skulu sendast til:

**Nærverkið / Heimatænastan**
Att: Jeanna í Lágabø, økisleiðari
Vágsvegur 45
900 Vágur

**Umsóknarfreist : 14. februar 2011.**

Nærverkið veitir tænastur til borgarar við serligum tørvi, sum búgva heima, á bústovnum ella á sambýlum. Vit skapa møguleikar fyri lívsgóðsku við støði í tørvi og førleika hjá tí einstaka. Okkara eyðkenni er, at starvsfólkið leggur dent á professionalismu, dygd og nærleika. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almannamálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Børn & Ung. Umleið 1600 fólk starvast í Nærverkinum.

NÆRVERKIÐ
www.naerverk.fo

Meginskrivstovan · Argjavegur 26 · Postsmoga 3037 · 110 Tórshavn
Tel 360000 · Faks 360001 · naerverk@naerverk.fo · www.naerverk.fo

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

# Kunningar- og samskiftisfólk til Fróðskaparsetur Føroya

**Søkt verður eftir einum dugnaligum, ágrýtnum og miðvísum kunningar- og samskiftisfólki til Fróðskaparsetur Føroya.**

Kunningar- og samskiftisfólkið er knýtt at Setursskrivstovuni, sum er miðfyrisitingin á Fróðskaparsetrinum. Í løtuni eru 13 starvsfólk beinleiðis knýtt at Setursskrivstovuni.

Fremsta uppgávan hjá kunningar- og samskiftisfólkinum er at samskipa og menna heimasíðuna hjá Setrinum. Aðrar týðandi uppgávur eru at gera kunningartilfar, samskipa starvsfólkatiltøk umframt arbeiða við vanligum kunningar- og fyrisitingarmálum.

**Høvuðsuppgávur:**

- hava ritstjórnaliga ábyrgd av heimasíðuni
- samskipa arbeiðið við støðugt at dagføra innihald og snið
- gera mannagongdir sum góðskutryggja og menna heimasíðuna
- samskipa kunningar- og lýsingarherferðir
- samskipa innanhýsis kunning og samskifti
- lýsa innanhýsis heimasíðupolitikk, reglur og mannagongdir saman við heimasíðubólkinum
- læra starvsfólk at brúka heimasíðuskipanina
- gera brúkaravegleiðingar til heimasíðuna
- umsita brúkarar á heimasíðuni

**Førleikakrøv:**
Tú skalt hava bachelor- ella kandidatútbúgving ella samsvarandi útbúgving frá lærdum háskúla. Harumframt skalt tú hava hollar royndir og vitan frá samskiftis- ella kunningararbeiði.

**Vit ímynda okkum, at tú:**

- sum persónur er ágrýtin, miðvísur og hevur evni og hegni til at arbeiða sjálvstøðugt
- dugir væl at samstarva í toymi, er ábyrgdarfullur og álítandi
- dugir væl at skriva og skrivar rætt, serliga á føroyskum, men eisini á enskum
- er framkomin teldubrúkari
- hevur góðan kunnleika til ymisk tekstviðgerðarforrit
- skal læra at brúka ritstjórnarliga partin av typo3-skipanini (í minsta lagi svarandi til skeiðið "Redaktør udvidet", leinki: linkfactory.dk)

**Tað er ein fyrimunur, um tú:**

- skilir hvussu html virkar
- hevur gott skil fyri PR-arbeiði
- dugir at brúka forrit til at gera lýsingar, eitt nú í PhotoShop, Illustrator
- hevur gott innlit í og áhuga fyri universitetsheiminum

**Løn og setanartreytir**
Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi fakfelag.

**Umsókn**
Umsókn við viðkomandi skjølum skal sendast til:

*Fróðskaparsetur Føroya*
*Setursskrivstovuna*
*J.C. Svabos gøtu 14*
*Postrúm 272*
*FO-110 Tórshavn*

Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 12. januar 2011. Starvið verður sett 15. februar 2011 ella skjótast til ber.

Fleiri upplýsingar um Fróðskaparsetur Føroya eru at finna á heimasíðuni www.setur.fo.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Rúnu Hjelm, fyrisitingarstjóra á runah@setur.fo ella á telefon 292504 ella Jóan Paula Joensen, rektara á jopajo@setur.fo ella á telefon 292503.

Fróðskaparsetur Føroya hevur sum høvuðsuppgávu at inna gransking og veita frálæru á hægsta altjóða stigi. Hesar deildir og skúlar, ið øll bjóða út hægri útbúgvingar, hoyra undir Fróðskaparsetrið: Føroyamálsdeildin, Náttúruvísindadeildin, Søgu- og samfelagsdeildin, harundir Granskingardepilin fyri Samfelagsmenning, Læraraskúlin og Sjúkrarøktarfrøðiskúlin. Arbeitt verður framvegis við bygnaðarbroytingum. Samlaða nettoútreiðslujáttanin fyri 2010 er 68 mió. kr. Umleið 100 starvsfólk arbeiða á Fróðskaparsetri Føroya. Tað eru umleið 540 fulltíðar lesandi á Fróðskaparsetri Føroya.

**FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA**
**Setursskrivstovan · tlf. 35 25 00 · J. C. Svabos gøta 14 · Postrúm 272 · 110 Tórshavn · www.setur.fo**





Altíð tað nýggjasta